SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Onkrir flokslimir vildu heldur havt eina stjórn til vinstru, men eg vænti mær gott samstarv*

*(Ingibjörg Sólrún Gísladóttir)*

# Ísland nýggja samgongustjórn

**Tólv ráðharrar hjá Sjálfstæðisflokkinum og Samfylkingini skulu stjórna Íslandi næstu árini**

Fyrrapartin var Geir H. Haarde, forsætisráðharri, á Bessastøðum og kunnaði Ólaf Ragnar Grímsson, forseta um, at Sjálfstæðisflokkurin og Samfylkingin vóru samdir um at skipa nýggja stjórn. Seinni skipaðu flokkarnir fyri tíðindafundi, har teir greiddu frá tí, sum teir hava sett sær fyri at fremja tey næstu árini.

Semjan um at skipa stjórn fekst endaliga í lag í gjár, tá teir báðir flokkarnir á innanhýsis fundum góðkendu orðalagið í samgonguskjalinum og málsøkjabýtið. Semja var um, at nýggja stjórnin skal hava tólv ráðharrar, soleiðis at teir fáa seks í part. Tað hevur millum annað kravt, at summi málsøki verða løgd saman og broytt. Eitt nú er landbúnaðurin lagdur afturat fiskivinnumálum.

**Ivi um ráðharrar**

Tað var longu frá byrjanini greitt, at Geir H. Haarde úr Sjálfstæðisflokkinum skuldi halda fram sum forsætisráðharri, og ráðharralistin fyrrapartin vísti eisini, at fimm av ráðharrunum hjá Sjálfstæðisflokkinum eru teir somu sum í undanfarnu stjórnini. Tað merkir millum annað, at Árni M. Mathiesen heldur fram sum fíggjarmálaráðharri, og at Einar K. Guðfinnsson heldur fram sum fiskimálaráðharri.

Tann einasti ráðharrin hjá Sjálfstæðisflokkinum, sum ikki heldur fram, er Sturla Böðvarsson. Hann hevur fingið tilboð um embætið sum altingsformaður ístaðin fyri, men sambært íslendsku fjølmiðlunum er hann als ikki nøgdur við tað, og at tað er ikki vist, at seinasta orðið er sagt í tí málinum.

Ráðharralistin hjá Samfylkingini var hinvegin klárur beinanvegin. Týdningarmesta málsøkið hjá flokkinum eru uttanríkismál, og tey skal floksformaðurin, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, umsita. Sostatt hevur Ísland framvegis eina kvinnu sum uttanríkisráðharra.

Av teimum tólv ráðharrunum í nýggju stjórnini eru fýra kvinnur, og av teimum eigur Samfylkingin tríggjar.





*Geir H. Haarde heldur fram sum forsætisráðharri*



*Ingibjörg Sólrún Gisladóttir er nýggjur uttanríkisráðharri*

## STUTT SAGT

### Óvæntað tekin um vatn

Eitt amerikanskt kanningarakfar hevur funnið nýggj tekin um, at rennandi vatn hevur verið á gongustjørnuni Mars eina ferð í tíðini. Kanningarakfarið, sum eitur Spirit, hevur funnið tilfar við so nógvum siliciumdioxidi, at tað kann bara koma frá vatni, siga granskararnir hjá NASA. Granskararnir siga, at teir eru ovfarnir av tí, sum Spirit hevur funnið, tí higartil er tað bara eitt annað kanningarakfar, Opportunity, sum hevur funnið tekin um vatn á Mars. Men granskararnir eru samstundis fegnir um, at teir nú kanska kunnu vænta sær fleiri óvæntað úrslit frá báðum kanningarakførunum.

### Umrøddu brúgv

Tá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, var í Berlin mánadagin og tingaðist við Angelu Merkel, kanslara, umrøddu tey millum annað tað ætlaðu Femernbrúnna millum Danmark og Týskland. Brúgvin, sum verður 19 kilometrar long, er mett at fara at kosta umleið 40 mia. krónur, men danir og týskarar ætla, at ES skal rinda 30 prosent av kostnaðinum. Á fundinum í Berlin samdust teir báðir leiðararnir um at skunda undir málið, so ES kann fáa eina umsókn um stuðul í summar.

### Hava tað gott

Tað búgva umleið 2,5 mió. muslimar í USA, og hóast teir eru lutfalsliga færri har enn í Vesturevropa, kenna teir seg tættari knýttar at samfelagnum, enn teirra trúarfelagar í Vesturevropa gera. Í einari kanning siga 47 prosent av teimum amerikonsku muslimunum, at teir kenna seg fyrst og fremst sum muslimar og síðani sum amerikanarar. Sama kanning vísir, at í 81 prosent av muslimunum í Bretlandi kenna seg fyrst og fremst sum muslimar og síðani sum bretar. Teir amerikonsku muslimarnir klára seg eisini munandi betur fíggjarliga enn muslimarnir í Vesturevropa.

# Ein sjáldsamur fiskur

**Vísindafólk halda, at coelacanth-fiskurin hevur framvegis somu útsjónd sum fyri 400 mió. árum síðani**

Í mong ár hildu vísindafólk, at coelacanth-fiskurin var útdeyður, men í 1938 bleiv ein veiddur úti fyri eysturafrikonsku strondini. Fjúrtan ár seinni fingu menn ein afturat, og síðani eru fleiri veiddir úti fyri eysturafrikonsku strondini.

Síðani 1998 eru nakrir av hesum fiskunum veiddir við indonesisku oynna Sulawesi. Síðsta vikuskiftið vóru Justinus Lahama og sonurin farnir at draga gørn norðan fyri oynna, og í einum garni fingu teir ein coelacanth-fisk. Teir hildu fiskinum livandi og sleptu honum í eina byrging í havnini, men 17 tímar seinni doyði fiskurin. Hann toldi ikki tann heita sjógvin. Fiskurin var 130 centimetrar langur og vigaði 100 pund.



*Justinus Lahama við tí sjáldsama fiskinum*